# Kunning um upptøkuroynd

Tey, sum vilja lesa bachelor í løgfrøði frá heysti 2023, skulu møta til upptøkuroynd mikudagin 28. juni 2023, kl 10-16. Royndin verður hildin á veghæddini á Søgu- og samfelagsdeildini, Jónas Broncksgøtu 25.

Upptøkuroyndin telur saman við miðnámsprógvi, viðkomandi royndum og eftirútbúgvingum v.m. í metingini av, hvør er skikkaður til upptøku. Umsøkjarar mugu tó í minsta lagi standa upptøkuroyndina við próvtalinum 7.

## Endamálið við royndini

At lesa lóg snýr seg ikki einans um at minnast og duga lógargreinar. Fatan av tí søguliga og samfelagsliga høpi, sum lóg og løgfrøði er partur av, er eisini av stórum týdningi. Løgfrøðingar mugu hava væl mentar førleikar í løgfrøðiligari greining, løgfrøðiligari hugsan og brúki av løgfrøðiligum grundreglum í síni argumentatión og samskifti. Útbúgvingarnar í lóg á Fróðskaparsetrinum eru lagaðar til hesa fatan.

Kortini er ikki møguligt at leggja hesar fortreytir niður í lesandi frá grundini av, men einans at menna víðari tað, sum tey hava við sær frá lívinum, skúla, miðnámsskúla og øðrum viðkomandi útbúgvingum og royndum.

Endamálið við upptøkuroyndini er tískil at kanna, um umsøkjarar hava nøktandi av grundleggjandi førleikum til at mennast víðari á løgfrøðiútbúgvingini. Sjálv upptøkuroyndin er kortini ikki ætlað at avdúka vitan, men heldur *fatan*, *hugsan*, *evni til loysn av trupulleikum* og evni til at *samskifta greitt og samanhangandi* á føroyskum, donskum og enskum (undantøk til hetta seinasta kunnu gerast vísandi til § 11 í heimastýrislógini).

## Um royndina sjálva

Royndin kemur at standa í fleiri ymiskum pørtum, ið ikki verður kunnað neyvt um frammanundan, men sum kemur at líkjast hesum:

- Uppgávur, ið geva mynd av, hvussu væl umsøkjarin dugir at loysa praktiskar trupulleikar og at grundgeva fyri sínum loysnum.
- Uppgávur, ið lýsa evnini hjá umsøkjara at skriva tekstir frá grundini á føroyskum, donskum og enskum og, á øllum hesum málum, argumentera og grundgeva fyri ymiskum loysnum.
- Uppgávur, har umsøkjari verður biðin um at tulka ymisk tekstasløg, so sum brot úr yrkingum, skaldsøgum, klassiskum politiskum bókmentum v.m. Eisini henda uppgáva kann verða sett, ella kravd svarað, á ymiskum málum.

**Praktiskir upplýsingar**

Umsøkjarar, sum ætla til upptøkuroynd 28. juni, skulu melda til í seinasta lagi **mikudag 21. juni, kl 12**. Hetta gerst við at senda boð til Lestrarskrivstovuna á LSS@setur.fo við fullum navni og føðingardegi.

Umsøkjarar skulu hava samleikaprógv við og egna farteldu og forleingjara til streym.

Uppgávuspurningarnir verða latnir í pappírsformi og á geyma.

Royndin verður dømd dulnevnt, har tey, sum rætta uppgávusvarini, ikki kenna samleikan á tí, sum hevur svarað, fyrr enn aftaná, at próvtal er givið. Í sambandi við tilmelding fáa umsøkjarar tískil eitt nummar, sum skal skrivast á innlatingina. Nærri verður kunnað um tað í sambandi við tilmeldingina.

Uppgávan skal svarast á tí word-skjalinum, ið liggur á geymanum, ið umsøkjarin fær handað til royndina.

Umsøkjarin skal konvertera svarið til pdf áðrenn innlating, so sum frægast slepst undan trupulleikum við ymiskum teldum og telduforritum.

Uppgávusvarini skulu BÆÐI latast inn á nevnda geyma og EISINI sendast á teldupostadressuna LSS@setur.fo

Internet er ikki loyvt, og samskifti við uttanfyristandandi er strangliga bannað og er burturvísingargrund.